# Starvsskipan fyri stýrið hjá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum

## Alment um starvsskipanina

§ 1 Vísandi til løgtingslóg nr. 39 frá 7. mai 1991 um Arbeiðsmarkanðareftirlønargrunnin § 6, stk. 3, við seinni broytingum, verður henda starvsskipan ásett at galda fyri stýrið hjá arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum. Starvsskipanin fær gildi, tá ið stýri grunsins hevur samtykt hana sambært § 2 í hesi starvsskipan og landsstýrismaðurin hevur góðkent hana sambært § 6, stk. 3 í omanfyri nevndu lóg um Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

§ 2 Henda starvsskipan kann broytast eftir uppskoti frá stýrislimunum, um tveir triðingar av stýrinum taka undir við broytingaruppskotinum. Slíkar broytingar fáa gildi fyri stýrið grunsins, tá ið stýrið og landsstýrismaðurin, sum ásett í § 1 omanfyri, hava samtykt sambært § 6, stk. 3 í omanfyri nevndu lóg um Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

## Val av stýrislimum

§ 3 Landsstýrismaðurin velur stýrislimirnar sambært § 6, stk. 1 í lógini um Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin. Limirnir verða valdir við navni soleiðis: ein umboðandi arbeiðsgevarar, ein umboðandi løntakarar og stjórin í Landsbanka Føroya Liminir verða valdir fyri trý ár í senn. Stýrislimur kann fara frá við at boða landssstýrismanninum frá hesum. Boðini til landsstýrismannin skulu vera skrivlig, og stýrið fyri grunnin skal hava avrit av boðunum.

§ 3 a Tá ið stýrislimur fer úr stýrinum, skal hann samstundis beinanvegin lata aftur ella burturbeina alt tilfar grunninum viðvíkjandi, sum hann hevur fingið sum stýrislimur.

## Leiðsla grunsins

§ 4 Stýrið er ovasta leiðsla grunsins og hevur endaligu ábyrgdina av øllum málum grunninum viðvíkjandi. Stýrið skal sita fyri grunninum sambært lógini um Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin, kunngerðum o.ø. eftir hesi lóg og annars sambært hesi starvsskipan og góðum stýrissiði.

§ 5 Formaðurin fyri stýrið er stjórin í Landsbanka Føroya, sambært § 6, stk. 1 í lógini um Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

§ 6 Stýrið ger eftir tørvi nágreiniligari avtalu um at umsita útgjøld, røkt av fæi o.tíl. hjá grunninum.

§ 7 Formaðurin teknar í øllum vanligum málum grunnin. Í slíkum málum er formanninum eisini heimilað at veita fulltrú. Er talan um útlán, at veðseta ognir hjá grunninum ella at taka lán, krevst undirtøka frá tveimum triðingum av stýrislimunum.

## Stýrisfundir

§ 8 Formaðurin hevur ábyrgd av, at stýrisfundir verða hildnir, tá ið tørvur er á tí. Ráðsfundir skulu, alt tað ber til, verða fráboðaðir við 7 daga freist. Við fundarinnkallingini skal strembast eftir, at alt fundartilfar verður sent við. Formaðurin leiðir stýrisfundirnar. Stýrisfundur skal í minsta lagi verða hildin einaferð hvørt hálvár. Biður ein limur í stýrinum um tað, so skal stýrisfundur verða hildin. Umboð fyri Taks verður innkallað á fund eftir tørvi Grannskoðarin hjá stýrinum hevur rætt at møta og úttala seg á teimum stýrisfundum, har roknskapurin, sum grannskoðarin áteknar, verður viðgjørdur. Grannskoðarin hevur skyldu at møta á stýrisfundinum, biður ein stýrislimur um tað.

## Viðtøkuføri

§ 9 Stýrisfundurin er viðtøkuførur, tá ið fundurin er fráboðaður sambært § 8 í hesi starvsskipan, og tá ið meira enn helmingurin av stýrislimunum eru møttir. Øll mál verða avgjørd við vanligum meiriluta. Stendur á jøvnum, er formansins atkvøða avgerandi. Tó kunnu mál, sum sambært hesi starvsskipan krevja ávísa undirtøku, bara samtykkjast, um ásetta talið av stýrislimum tekur undir við hesum. Avgerðir hjá stýrinum kunnu verða kærdar til landsstýrismannin sambært § 7 í lógini um Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin.

## Ógegni

§ 10 Stýrislimur ella ein av teimum stovnum, sum stýrið hevur gjørt avtalu við sambært § 6 í hesi starvsskipan, mugu ikki viðgera mál, sum viðvíkja viðkomandi sjálvum ella sum kunnu hava serligan áhuga fyri viðkomandi. Stýrislimur, sum sambært lógini um Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin eftir vanligu reglunum hevur rætt at fáa gjald úr grunninum, er ikki ógegnigur bara av hesi orsøk.

## Gerðabók

§ 11 Stýrið skal á hvørjum fundi føra gerðabók yvir øll mál, sum stýrið viðger. Í gerðabókini skal harumframt verða skrivað yvirlit yvir stýrislimir, sum eru á fundinum, og soleiðis staðfestast, um fundurin er viðtøkuførur, dagskrá fyri fundin og dagfesting. Formaðurin hevur ábyrgd av, at gerðabókin verður skrivað og løgd fyri allar stýrislimirnar, sum eru til staðar, at undirskriva. Við undirskrivingini vátta stýrislimirnir, at gerðabókin verður góðtikin. Tekur stýrislimur ikki undir við avgerðunum hjá stýrinum, skal tað, biður viðkomandi stýrislimur um tað, verða ført í gerðabókina.

§ 12 Stýrislimir, sum ikki hava verið á stýrisfundi, skulu seinni vátta í gerðabókini, at teir hava kunnað seg um innihaldið í gerðabókini.

## Ársroknskapur

§ 13 Tað áliggur stýrinum fyri grunnin at gera og leggja fram ársroknskap, soleiðis sum góður roknskaparsiður ásetur. Ársroknskapurin, sum skal verða grannskoðað sambært § 15 í hesi starvsskipan, skal verða greiddur úr hondum og stýri skal hava góðkent hann í seinasta lagi 6 mánaðir eftir árslok. Saman við ársroknskapinum ger stýrið ársfrágreiðing. Ársroknskaparárið er frá 1. januar til 31. desember.

§ 14 Á hvørjum ári, í seinasta lagi seks mánaðir eftir árslok, heldur stýrið ein stýrisfund at góðkenna roknskapin hjá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum. Skráin fyri fundin er sambært § 15 í hesi starvsskipan. Á hesum stýrisfundi verður valdur ein fundarstjóri, sum ikki kann vera formaðurin fyri grunnin. Á roknskaparfundinum verður førd gerðabók sum tilskilað í § 11 í hesi starvsskipan.

§ 15 Árligi roknskaparfundurin sambært grein §14 verður hildin við hesi skrá:

Frágreiðing frá formanninum
Góðtaka ársroknskapin
Velja grannskoðara
Ymiskt

## Grannskoðan

§ 16 Stýrið velur sambært § 15 í hesi starvsskipan grannskoðara til at grannskoða ársroknskapin. Tað liggur á stýrinum at geva grannskoðaranum allar upplýsingar, sum grannskoðarin heldur vera neyðugar fyri at kunna grannskoða ársroknskapin nøktandi, her uppií fyri at meta um grunsins aktiv og passiv, fíggjarligu støðu og úrslit.

§ 17 Grannskoðarin skal í sambandi við framdu grannskoðanina føra eina grannskoðanar-protokol, sum skal verða lagt fyri stýrið á fyrsta stýrisfundi, eftir at grannskoðanarprotokollin er latin stýrinum. Stýrið skal, við at skriva undir grannskoðanarprotokollina, vátta at hava kunnað seg um tað, sum stendur í grannskoðanarprotokollini.

## Tagnarskylda

§ 18 Stýrislimirnir hava tagnarskyldu í øllum málum grunninum viðvíkjandi, sum hann fær kunnleika um í sambandi við yrki sítt sum stýrislimir. Hetta er tó ikki galdandi í málum, sum eru ætlað at almannakunngera.

## Røkt av fæi grunsins

§ 19 Grunnurin skal í allar mátar røkja fæ grunsins á besta hátt til frama fyri grunnin og eftir teimum fyriskipanum, sum landsstýrismaðurin ásetur sambært § 5, stk. 3 í lógini um Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin. Stýrið kann innan hesar karmar áseta neyvari fyriskipanir um at røktja fæ grunsins, her uppií um innanvirkis eftirlitsskipanir. Stýrið kann gera avtalu við Landsbankan um at røkja fæið.

## Gjald úr grunninum

§20 Grunnurin skal lata arbeiðsmarknaðareftirløn úr grunninum sambært 3. parti í lógini um Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin og annars eftir teimum fyriskipanum, sum landsstýrsmaðurin hevur ásett sambært § 5, stk. 2 í lógini um Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin. Stýrið ásetur eftir tørvi innanfyri hesar karmar neyvari fyriskipanir um útgjaldingar úr grunninum.

## Samsýng

§ 21 Stýrið ásetur reglur fyri ta samsýning, sum tað fær fyri arbeiði sítt fyri grunnin. Landsstýrismaðurin skal góðkenna samsýningina.

## Avskrivingar

§ 22 Stýrið ásetur nágreiniligari reglur fyri, nær krøv sambært 2. parti í lógini um arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnin kunnu verða avskrivað. Landsstýrismaðurin skal góðkenna reglurnar. AM-gjaldið hjá feløgum, skrásett hjá Skráseting Føroya, verður avskrivað, tá feløgini eru strikaði í skrásetingini og fráboðan er komin um, at dekningur ikki er fyri kravinum.

Hjá øðrum feløgum og stovnum syrgir TAKS fyri at halda lív í kravinum til skuldin er fingin inn, ella til felagið/stovnurin ikki er til meira.

## Gildisvirknaður o.tíl.

§ 23 Henda starvsskipan fær gildi sum ásett í §§ 1 og 2 omanfyri. Allir stýrislimir skulu skriva undir starvsskipanina Hvør stýrislimur skal hava avrit av starvsskipanini. Somuleiðis skulu teir stovnar, sum grunnurin hevur gjørt avtalu við sambært § 6 í hesi starvsskipan á hóskandi hátt verða kunnaðir um starvsskipanina.

**Stýrið fyri Arbeisðmarknaðareftirlønargrunnin**

Tórshavn, tann 26/9 2023

**Góðkent av Føroya landsstýri**

Tórshavn, tann 28/9 2023